FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 18. desember 2020
J. nr.: 20/00571-2
Viðgjørt: JEK

Svar uppá fyrispurning nr. 53/2020 eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur frá Johan Dahl, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar eru grundgevingarnar fyri, at ávísir persónar, sum eru fluttir til Føroya fyri nógvum árum síðan, og sum síðan eru vorðnir pensjónistar, ikki fáa fult útgjald úr AMEG fyri tíðarskeiðið 2009-2018?
2. Hvørja upphædd árliga er talan um fyri at fáa fult útgjald til hesar pensjónistar?
3. Arbeiðir landsstýrismaðurin við at broyta lógina, soleiðis at vantandi útgjaldið úr AMEG til hesar pensjónistar verður útgoldið fyri tíðarskeiðið 2009-2018?

Svar:

Til nr. 1

Við løgtingsmáli nr. 87/2008 varð løgtingslógin um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin broytt.

Uppskotið kom í gildi 1. januar 2009.

Ein av broytingunum í uppskotinum var § 3 í løgtingslógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

Við hesi broyting fingu allir persónar rætt til arbeiðsmarknaðareftirløn, tá teir gjørdist 67 ár treytað av, at teir, meðan teir vóru millum 15 ár og 67 ár, høvdu havt fastan bústað í Føroyum og verið skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum í minst trý ár.

Rætturin varð avmarkaður til 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið ein hevði havt fastan bústað í Føroyum, meðan viðkomandi var millum 15 og 67 ára gamal.

Minsta upphæddin og mesta upphæddin vóru ávikavist 3/40 og 40/40 av fullari eftirløn. Almenna kravið um, at persónurin skuldi hava fastan bústað í Føroyum fyri at fáa rætt til útgjald varð slept.

Ongin treyt var um, at persónurin skuldi hava rindað inn í grunnin. Sostatt høvdu - sum higartil - eisini t.d. heimagangandi hjúnafelagar rætt til eftirløn á jøvnum føti við onnur, men støddin av

útgjaldinum var grundað á tíðarskeiðið, viðkomandi hevði havt fastan bústað í Føroyum í tíðarbilinum viðkomandi persónur var millum 15 og 67 ár.

Fyri ikki lækka upphæddina hjá teimum, sum longu fingu útgoldið arbeiðsmarknaðareftirløn sambært treytunum, sum higartil høvdu verið galdandi, ávirkaði uppskotið ikki upphæddina hjá hesum pensjónistunum. Uppskotið hevði hinvegin týdning fyri allar persónar, sum ikki høvdu nátt útgjaldsaldurin.

Tilflytarar, ið vóru 64 ár ella eldri, tá lógin kom í gildi og sum ikki høvdu møguleika fyri at uppfylla minsta kravið um at hava havt fastan bústað í Føroyum í minst trý ár, meðan teir vóru millum 15 og 67 ára gamlir, blivu frítiknir frá skylduni at rinda inn í grunnin. Hinvegin fingu tilflytarar, sum áður høvdu havt fastan bústað í Føroyum, meðan teir vóru millum 15 og 67 ár, rætt til eftirløn sambært ásetingunum í § 3. Hesin rætturin hevði virknað at rokna frá 1. januar 2009 og hevði sostatt ikki virknað fyri útgjøld aftur í tíð.

Til nr. 2
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin hevur við støði í dátastovni grunsins upplýst, at árligi meirkostnaður grunsins hevði verið ávikavist 1,3 mió. kr. í **2009**, 5,3 mió. kr. í **2010**, 7,2 mió. kr. **2011**, 8,4 mió. kr. í **2012**, 10,6 mió. kr. í **2013**, 12,5 mió. kr. í **2014**, 13,8 mió. kr. í **2015**, 19,9 mió. kr. í **2016**, 22,7 mió. kr. **2017** og 27,7 mió. kr. í **2018** ella í alt umleið 130 mió. kr., um full upphædd afturvirkandi skuldi verið goldin pensjónistum við brotpensjón.

Til nr. 3
Nei, landsstýrismaðurin arbeiðir ikki við at broyta løgtingslógina um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, soleiðis at hægri útgjald verður goldið afturvirkandi fyri tíðarskeiðið 2009-2018.

Tinganes, 18. desember 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum